# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar

3. desember fingu Winnie Thomsen og John Martin Poulsen, Hvalba, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3930 gr.

11. desember fingu Ingrid og Hans Jacob Heinesen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4250 gr.

11. desember fingu Bergljót og Lars Liengård, Hoyvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4160 gr.

12. desember fingu Maja Højsted og Danny Osberg Hansen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4450 gr.

12. desember fingu Harriet og John Anthoniussen, Húsavík, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4500 gr.

13. desember fingu Jutta og John Just á Marknagili, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3500 gr.

14. desember fingu Annelin og Sámal Davidsen, Kvívík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4500 gr.

14. desember fingu Maria og Atli Simonsen, Hoyvík, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4300 gr.

15. desember fingu Halldis Hansen, Nólsoy, og Hjørleif Rein, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3400 gr.

15. desember fingu Ingibjørg Eysturoy og Johannes Olsen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4200 gr.

15. desember fingu Rúna Heðinsdóttir og Søren Søgaard, Leirvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3700 gr.

15. desember fingu Laura í Geil og Ragnvald Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 2900 gr.

16. desember fingu Eyðna Hammer og Jann Thomsen, Streymnes, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3350 gr.

16. desember fingu Kristianna Poulsen og Jens Hentze Olsen, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3850 gr.

17. desember fingu Dorrit og Eyðtór Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3400 gr.

## Andlát

11. desember
Birgitte Margrethe Viderø, vanliga nevnd Birta, ættað av Viðareiði, búsitandi í Tórshavn, 96 ár.
Malla Devine,Tórshavn, ættað av Argjum, 77 ár.

12. desember
Svanhilda Jacobsen á Glyvrum, vanliga nevnd Durna, 80 ár.
Jóna Thomassen, fødd Joensen, ættað úr Vági, búsitandi í Havn, 69 ár.
Olivia Sørensen, Klaksvík, 88 ár.
Solveig Weihe, fødd Mouritsen, búsitandi í Værløse, 65 ár.

14. desember
Hans Arni Ellefsen, Miðvágur, 80 ár
Lina Arge, Tórshavn, 85 ár

15. desember
Laina Hansen, Toftir, 80 ár.
Ingrid Vang, Kaldbak, 90 ára gomul.

## Minningarorð um beiggja mín

# Jens Paula Poulsen

**F 15.06.1952 - d 04.10.2003**



Nú hvítna tindar fjøllum á, ja soleiðis varð sungið til jarðarferðina og soleiðis var eisini henda kalda heystarmorgun , tá vit fóru til Fámjins eftir veðrunum, sum vit hava gjørt tey seinastu nógvu árini. At tað skuldi enda soleiðis, at tú ikki kom heimaftur á lívi, tað er og verður mær óskiljandi.

Tú var næst elstur av okkum fimm systkjum, og høvdu vit báðir nógv saman, nú hini systkini vóru flutt av oynni, og tað bara vóru vit báðir eftir her, tú á Tvøroyri, og eg í Vági.

Eftir lokna skúlagongd fór tú at læra til timburmann. Tá tú var liðugur at læra, arbeiddi tú eina tíð á Tvøroyri, og fór síðan til Grønlands at arbeiða í nøkur ár. Í 1987 fekk tú starv sum portørur á Suðuroyar Sjúkrahúsi, tað dámdi tær væl, og var tú sera nógv avhildin bæði av starvsfólkunum og ikki minst av sjúklingunum, altíð klárur at hjálpa, eitt smíl, eina stuttliga viðmerking, tað var bara tú. At tú var nógv avhildin sást á tí stóru mannafjøld, sum fylgdu tær til seinasta hvíldarstað her á fold.

Jens Pauli var tvøramaður við stórum T. Var á Sevmýri til hvønn fótbóltsdyst, sum yngri spældi tú á 1. deild hjá TB. Eisini spældu tú billiard og var ein hollur stuðul hjá billiardfelagnum, har tú eisini tók tær av at venja ungdómin, hetta dámdi tær væl, og dugdu tú væl at læra frá tær.

Tankarnir leita aftur til barnaárini við Sílánna, tú var 11 ár eldri enn eg og altíð sera góður við meg, hevði eg gjørt okkurt skeivt og fekk skjeld, tók tú meg altíð í forsvar. Allar teir túrar tú koyrdi meg á knallert og sleipaði meg á sleðu tá kavi var. Seinni tá tú fekk motorcyklu, eina Triumph, koyrdu vit mangar túrar, ofta til Øravíkar at vitja. Minnist tá tú fekk tín fyrsta bil, og tá eg so fekk koyrukort og slapp at læna tín svarta Honda Accord, vakrasta bil í oynni, helt eg, reinur og nýbonaður, ja tú var góður við tað tú átti og fór væl um tað.

Tú giftust við Súsonnu og búsettist í Valinum, og fingu tit tvey børn, Poul Arna og Sólvu.

Heim tykkara stendur í brekkuni mitt ímillum runnar og trøð av alskyns slagi, og er tað ein fragd fyri eyga at síggja tykkara vælhildna heim og sera vakra urtagarð, sum tú gekk sera høgt uppí.

Seinni tá eg flutti til Vágs og skuldi byggja hús, var tú altíð klárur at hjálpa mær.

Og tá slakti var fyri, hjálptust vit báðir altíð, og tá stikast skuldi í Øravík, Fámjin ella her suðuri, ella tá vit skuldi reka, vóru tú og hundurin Roy góð hjálp at fáa.

Tá vit vitjaðu tykkum, var blíðskapurin stórur, og vit minnast aftur á nógvar góðar løtur. Tú dugdu væl við børnum, og tað besta okkara børn vistu, var at fara á Tvøroyri at vitja tykkum.

Tú dámdi gott at ferðast, og hava tit verið víða, á brúdleypsferð á Kreta, við bili og campingvogni í Danmark, Týsklandi, Skotlandi og Fraklandi, ja, tá livdu tú mitt í verðini.

Tungt er hjá mammu og pappa, nú ongin kemur at fáa sær kaffimunn um morgunin. Tað var fast hjá Jens Paula og Roy at koma út til tykkara, tá hann hevði frí.

Saknurin er stórur nú Jens Pauli ikki er okkara millum longur, serliga hjá tykkum Súsannu, Poul Arna og Sólvu, og hjá tykkum Mamma og Pappa, má Harrin styrkja tykkum, og okkum øll.

Og einaferð vit fáa boð,
tá síðstu ferð vit anda,
úr heiminum vit fara so,
hjá tær um ævir standa

Takk fyri tað tú var fyri meg og míni.

Eg vil hervið lýsa frið yvir minnið um beiggja mín Jens Paula Poulsen

**Tórður**

# Skipara- og stýrimansprógv fyri 25 árum síðan



21. desember 1978 var hátíðarhald á Føroya Sjómansskúla í sambandi við at prógv vórðu handað skipsførarum og stýrimonnum.

Teir sum fingu skipsføraraprógv vóru hesir: Holgar G. Durhuus, Vestmanna, Jákup H. Gøte, Toftir, Gullbrandur T. Olsen, Hósvík, Dánial Eliassen, Mikladalur, og Petur G. Gullaksen, Kirkja.

Teir sum fingu stýrimansprógv vóru hesir: Meinhard Petersen, Klaksvík, Hermann K. Joensen, Oyndarfjørður, Erling Leonson, Sørvágur, Súni T. Olsen, Hósvík, Martin S. Kruse, Sørvágur, Erland Olsen, Rituvík, Poul J. Leivs-garð, Klaksvík, Finnbogi Jensen, Tórshavn, Rasmus L. Feilberg, Fuglafjørður, Oddur Holm, Hvalba, Gunnar Hemming Dahl-Olsen, Vestmanna, og Jákup F. Thomsen, Skála.

*Kelda: Myndaárbókin, árið ið fór 1979*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Gunleivur Mouritsen 70 ár



Gunleivur Karbech Mouritsen í Havn fylti 70 ár 19. desember.

Gunleivur er elstur av tólv systkjum, 7 dreingjum og 5 systrum. Foreldur hansara eru Carl Karbech Mouritsen úr Snikkarastovu í Havn og Signhild Margretha, fødd Joensen, úr Sørvági. Gigga nærkast teimum 90 árunum.

Hjá Gunleivi man arbeiðssemi hava ligið í frá barnsbeini. Longu sum smádrongur var hann býdrongur á Gamla Vaskarí í Tórsgøtu. Fjúrtan ára gamal fór hann í bakaralæru hjá Andrias Jacobsen í Køkubúðini. Hetta var í 1948, og tá var neyðugt at fara til Danmarkar at taka sveinaroynd, og var hann í Kalundborg í hálvtannað ár av lærutíðini til sveinabræv var tikið í 1953.

Heimaftur komin arbeiddi hann í bakarínum á hotellinum í Vestmanna í 1954. Síðan arbeiddi hann í bakarínum hjá Fants Restorff í 10 ár til hann saman við konuni Morid byrjaði egið bakarí í 1965. Tey keyptu tá Heimabakaríið hjá Doru á Gripsvegnum.

Morid, fødd Mortensen úr Havn, og Gunleivur giftust í 1958. Synirnir Martin og Carl eita eftir abbunum. Carl rekur bakaríið í dag, og Martin er leiðari á Musikkskúlaskipanini. Abbabørnini eru sjey.

Aftrat sær í bakarínum ta fyrstu tíðina høvdu tey ein svein og eina krambakvinnu. Millum kundarnar vóru handlar í Havn, keypmenn á bygd, skip og bátar. Bakaríið á umleið 40 fermetrar var ein tilbygningur til sethúsini. Virksemi vaks alla tíðina og í 1972 varð bygt út á Gripsvegnum.

Hetta hevur sjálvandi verið eitt slitsamt lív, men Gunleivur hevur kent, at hetta var tað rætta, og fríløturnar hevur hann eisini notið. Bát hevur hann havt heilt frá ungum árum, var íðin sílafiskari eina tíð, og heldur enn við B36.

Tónleikur hevur framvegis hansara stóra áhuga og fleiri abbabørn fáast við tónleik. Nakrar upptøkur vóru gjørdar tey fyrstu jólini í Útvarp Føroya í 1957 av jólasangum við sytkjunum, og har leikar Gunleivur á banjo. Hann spældi á cornet í orkestrinum GHM í 40 ár.

Gunleivur gavst at arbeiða í bakarínum í 1999. Í dag eru heilt øðrvísi umstøður á Hoyvíksvegnum har hann dagliga vitjar, men nú hinumegin diskin.

## Anfinn Gærdum 50 ár



Sunnudagin 21. desember fyllir Anfinn Gærdum lærari á Strondum 50 ár.

Anfinn er føddur og uppvaksin á Strondum. Hann er elstur av teimum seks børnunum hjá Paulu, f. Bertholdsen, og Anker Gærdum.

Við tað at eingin framhaldsdeild var á Strondum var farið yvirum fjørðin at taka realprógv.

Pápin var skipari, og var Anker til skips við honum, til hann sum 26 ára gamal fór á sjómansskúla at lesa til skipsførara. Hann gjørdi ikki nógv burtur úr próvnum, tí longu tvey ár eftir fór hann á læraraskúla. Fekk prógvið í 1986 og hevur síðan starvast sum lærari við Stranda Skúla.

Í 1989 var hann við til at stovna eitt ungmannafelag, sum fekk navnið Strálan. Hann hevur frá fyrsta degi verið formaður í felagnum.

Í 1991 kom seksmannafarið Strálan og fyri tveimum mánaðum síðan kom nýggjur bátur - eitt nýtt seksmannafar. Anfinn brúkar nógv av frítíð síni til ungdómsarbeiði.

Føðingardagurin verður hildin í Bygdarhúsinum á Strondum leygarkvøldið 20. desember.

## Christian C. Nielsen stjóri fimmti



Í dag 20. desember verður Christian C. Nielsen, sjóri á Trygd fimti. Christian er dani og er ættaður úr Kerteminde. Móður hansara er Margrethe Nielsen, sum er búðsitandi í Kerteminde. Faðir hansara kallaðist Poul Cornelius Nielsen, ið andaðist í 1992. Poul var fjarritari, millum annað umborð á Esso Baltica, sum eisini sigldi uppá Føroyar. Her kom Christian sum barn at kenna Føroyar á fyrsta sinni.

Christian tók í 1981 løgfrøðisligt embætisprógv á universitetinum í Århus. Hann hevur starvast sum fulltrúi á Ankenævnet for Forsikring, og sum deildarstjóri í tryggingarfelagnum Østifterne, og haraftrat sum deildarstjóri hjá GF Forsikring.

Christian kom til Føroya í novenber 1997, tá hann varð settur sum stjóri hjá Trygd, í sambandi við at Trygd varð endurstovnað og aftur fór undir at tekna tryggingar. Christian er kendur fyri sítt dugnasemi og sína nýhugsan innan tryggingarøkið. Hann hevur staðið á odda fyri at víðka um virksemið hjá Trygd til í dag at fevna um nærum øll sløg av tryggingum.

Christian er giftur við Lis f. Andreasen. Christian eigur tvær døtur Elisabeth og Henriette.

# Mamy Dahl Sørensen leiðari í Dagtilhaldinum



Týsdagin samtykti Klaksvíkar býráð at seta Mamy Dahl Sørensen á Viðareiði sum nýggjan leiðara í Dagtilhaldinum fyri pensjónistar í Hvíthúsi við Klaksvíksvegin.

Mamy Dahl Sørensen er útbúgvin landmálari og heilsurøktari, og hon tekur við starvinum fyrst í komandi ári.

Higartil hevur leiðarin bert verið í parttíðarstarvi. Men nýggi leiðarin er settur í fulltíðarstarv, og tí fer tilhaldið at verða meira opið í framtíðini.

– Eg ætli mær at geva pensjónistunum ein fjølbroytta samveru í hugnaligum umhvørvi, sigur Mamy Dahl Sørensen, sum fer at leggja dent á, at pensjónistarnir skulu kenna seg vælkomnar.

Hon sigur, at møguleikarnir verða fleiri, nú meira verður opið, eitt nú ber til at skipa fyri ymsum ítrivi, kvøldsetum, café o. s. fr. Eisini fer at bera til at skipa fyri tiltøkum undir kvøldskúlaskipanini, sigur hon.

# Malfrid Svabo 85 ár

**Ein heilsan til mammu á 85 ára degnum**



Tað er ikki til at skilja, at tú í dag fyllir 85 ár. Tú, sum altíð er tann fyrsta til at varta okkum, og onnur, ið koma inn á gólvið, upp. Tú hevur altíð verið super aktiv og hevur enn ógvuliga ringt við at sita still. Tað er ikki av ongum, at títt fyrsta langommubarn gav tær navnið »Hoppomma«.

Taka tað í »slow motion«, tað dugir tú illa. Har, sum tú ert, skal tað ganga skjótt fyri seg.

Ikki ætlaði tú at gera tað stóra burtur úr hesum føðingardegnum. Men at liggja á B5 við einum brotnum beini føðingardagin, var ikki tín ætlan fyri einum mánað síðani.

Góða mamma. Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum og alt væl í framtíðini.

Vit gleða okkum til at fáa teg heim til jólar.

Kærar heilsanir og tøkk fyri alt, ið tú ert fyri okkum.

**Børn, svigarbørn, ommu- og langommubørn**

## 60 ár

Í dag, 20. desember, verður Hjørdis Egholm Mortensen, Tórshavn, 60 ár.

Vinfólk, kenningar og familja eru henda dag vælkomin í Sjónleikarhúsið har »opið hús« verður millum k. 11.00 og 15.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Brúdleyp

Í dag, 20. desember, kl. 11.30 giftast í Vesturkirkjuni Rannvá Hentze Rasmussen, Argir, og Dávid Reinert Davidsen, Tórshavn.

Veitsla verður í Leguhúsinum í Nesvík kl. 15.00.

Í dag, 20. desember, kl. 15.00 giftast í Skála kirkju Súsanna Poulsen, Skála, og Jógvan Næs, Tórshavn.

# Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á 70 ára føðingardegnum hjá Niclasi 1. desember takka vit hjartaliga.

Tykkum øllum, slekt og vinum ynskja vit eini gleðilig jól og Harrans signað nýggjár.

**Anna og Niclas Akraberg Poulsen**